# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Sigrun Gunnarsdóttir í Focus

Fríggjadagin 9. februar kl. 16 til 18 verður fernisering í Galerie Focus í sambandi við at Sigrun Gunnarsdóttir listakvinna á Eiði letur upp ein málningaframsýning.

Sigrun er fødd í 1950 á Eiði. Hon hevur sína útbúgving frá Askou Jensen á Glypotekinum í Keypmannahavn, 1971-1973 og "Det Kongelige Danske Kunstakademi (málara og grafikaralinjan) 1973-1980.

Opið er týsdag til fríggjadag kl. 15-18 og leygardag kl. 16-18.

Framsýningin er opin til 22. februar.



*Listakvinnan Sigrun Gunnarsdóttir letur upp eina málningaframsýning í Galerie Focus fríggjadagin 9. februar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Skipsførarar hjá Torm

Tað er ikki ofta at fleiri av skipsførarnum hjá reiðaríinum TORM A/S í Danmark eru heima samstundis – men nú í januar vóru so hesir heima, og nýttu teir høvið til at koma saman til eitt Torm Treff – har teir kundu vera saman eitt kvøld og tosa um ymisk viðurskifti, bæði arbeiðsliga sum ábyrgdarhavandi av skipum uppá 80 til 100 túsund tons úti í stóru verð - og so eisini tað dagliga lívið, tá teir eru heima hjá familjuni.

"Sorrig og glæde – de vandrer til hope" sigur eitt danskt orðatak, og tað máttu teir so eisini sanna hesaferð, teir vóru heima. Tað var ein tungur dagur, tá teir fylgdu teirra góða vini og trúgva skipsfelaga hjá Torm, hvalbinginum Narva Norðberg, búsitandi á Strondum, til hansara seinasta hvíldarstað. Narvi var nógv umhildin hjá reiðaríinum, har hann silgdi sum yvirstýrimaður.

*Her eru fýra norðoyingar, sum allir eru kaptajnar hjá TORM, f.v: John Mørkøre, John Petersen, Kári millum Garðarnar úr Klaksvík og Jens Kristian Simonsen av Viðareiði*



Postverk Føroya:

## Frímerkjadeildin við nýggjum frímerkjum

TÍÐINDASKRIV

Mánadagin 12. februar 2007 gevur Frímerkjadeildin út nýggj frímerki.

Útkemur eitt frímerkjaark við tíggju frímerkjum, ið lýsa søgnina um kópakonuna. Edward Fuglø hevur teknað myndirnar.

Tvey frímerki av gomlum steinprentum verða somuleiðis givin út. Upprunaligu steinprentini stava frá 1839 og eru frá eini franskari rannsóknarferð í Norðuratlantshavi.

Fyrra myndin sýnir rannsóknarskipið "La Recherche" við Nólsoynni í baksýni meðan hin myndin er av Skælingsfjalli.

Frímerkjadeildin hevur lagt til rættis.

"Alduorka" er heitið á seinasta frímerkinum á hesum sinni.

Hetta er ein felags frímerkjaútgáva saman við Ísland og Grønlandi, har evnið "umhvørvisvinalig orka" verður lýst.

Føroyska ískoytið lýsir alduorku, meðan tað íslendska og grønlendska ávikavist lýsa jarðarhita og vatnorku.




*Eitt av frímerkjunum við rannsóknarskipinum "La Recherche" við Nólsoynni í baksýni*

## Kristiligur fundur í Føroyahúsinum

Fríggjakvøldið klokkan 20.30, skipar samkoman í Kristnastovu fyri kristiligum fundi í Føroyahúsinum á Vesterbrogade 17A í Keypmannahavn.

Jógvan Jacobsen talar. Sylvia Sivertsen syngur tveir sangir, og á skránni verður eisini felagssangur, drama, videoløg og ókeypis drekkamuður.

Meira fæst at vita á www.kristnastova.dk og www.faroehouse.dk

